Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 02.05.2019 kl. 17:30
Málnr.: 16/01208
Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Tummas J. Lervig, Beinta Klakstein, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
58/19	19/00574-1	Val av limum í Felagið fyri ferðavinnuna í norðoyggjum
59/19	14/00983-24	Tunlarnir norður um fjall - Avlopstilfar
60/19	19/00481-1	Regulering av økismarki suður og vestureftir (B14)
61/19	18/00518-18	Fastognir, íløgur - raðfesting 2019
62/19	18/00518-22	Byggibúning bústaðir, íløgur - raðfesting 2019
63/19	19/00326-6	Ferðavinnuátak - closed for maintenance
64/19	19/00423-3	Byggiloyvi til ljósmastrar til vøllin við Djúpumýru
65/19	19/00502-4	Tónlistaskúlin - hækkað lønarstøði eftir sáttmálasamráðingar - *eykajáttan, fyrra viðgerð*
66/19	18/00501-21	Dagstovnaeindin á Brekku – *eykajáttan, seinna viðgerð*
67/19	18/00496-54	Framflytingar 2018/2019 – *seinna viðgerð*
68/19	18/00052-28	Nýtsla av vardum verkum – Fjølrit – *eykajáttan, seinna viðgerð*

58/19

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	02.05.2019	58/19

19/00574-1 Val av limum í felagið fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum

Frágreiðing um málið:
Ferðavinnan í Norðoyggjum hevði tann 30. apríl aðalfund, har tær av kommununi viðmæltu viðtøkur vóru samtyktar. Sambært samtyktu viðtøkunum, skal Klaksvíkar kommuna velja tveir limir í nevndina fyri felagið fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum, ein umboðandi umsiting kommununnar og ein umboðandi mentanarøkið (úti í býnum).

Lógargrundarlag:
Viðtøkurnar fyri felagið Ferðavinnan í Norðoyggjum.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar.

Tilmæli:
Býráðið verður at velja tveir limir í nevndina fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Einmælt samtykt at velja Eirik í Jákupsstovu, umboðandi umsiting kommununnar, og Súna Anthoniussen, umboðandi mentanarøkið úti í býnum/kommununi.
Tiltakslimir eru Dávur Winther fyri Eirik í Jákupsstovu, og Jóhannus Kallsgarð Joensen fyri Súna Anthoniussen.

59/19

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	23.04.2019	17/19
2 Ferðslunevndin	24.04.2019	K-6/19
3 Tekniska Nevnd	24.04.2019	37/19
4 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	26.04.2019	70/19
5 Fíggjarnevndin	30.04.2019	45/19
6 Klaksvíkar Býráð	02.05.2019	59/19
7 Ánanevndin	08.05.2019	7/19
8 Árnafjarðarnevndin	09.05.2019	5/19

14/00983-24 Tunnlarnir norður um fjall - Avlopstilfar

Frágreiðing um málið:
Landsverk hevur á fundi tann 4. apríl 2019 spurt Klaksvíkar kommunu, um áhugi er fyri at taka ímóti avlopsgróti úr tunlunum norður um Fjall, og um so er, at vísa á stød í kommununi, har grótið kann leggjast. Landsverk upplýsir, at tunnilsarbeiðið kann byrja um árskiftið 2020/2021, um politisk undirtøka er fyri málinum.

Landsverk fer í næstum at senda málið til friðingarmyndugleikan, og verður kravt í hesum sambandi, at Landsverk vísir á eina ætlan fyri, hvussu farið verður fram við avlopstilfari frá verkætlanini. Útrokningar vísa, at einir 430 túsund rúmmetrar av gróti fáast úr báðum tunlum.

Ymiskar verkætlanir hava verið umrøddar, umframt ymisk stød, har grótið kann leggjast.

Kommunan hevur mint Landsverk á, at tað verður óheppið, um Landsverk fer undir at selja grót í Norðoyggjum, tí tað fer at taka grundarlagið undan kommunalu grót- og tilfarssøluni.

Møgulig stød, har grót úr tunlunum kann leggjast:

- Byrgingin um Haraldssund
- Umkoyringarvegurin undir Kjøli
- Víðkan av bátahylinum í Árnafirði
- Grønhøvdi
- Norðhavnin
- Grót í samband við eyrmóttøku

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ókent pr. dags dato.

Tilmæli:
Við hesum verður mælt til, at nevndir og býráð í fyrsta umfari viðgera spurningin um, hvar grótið skal leggjast, og at heimild verður givin til eitt ávíst ráðleggingararbeiði í hesum sambandi, sum merkir, at tekningar/skitsur skulu gerast, sum sýna kommunalu økini, har gróttilfar skal leggjast.

Havna- og Vinnunevndin 23. apríl 2019
Nevndin tekur undir við málinum, og mælir nevndin til hesa raðfesting:
1. Norðhavnin
2. Árnafjørður
3. Grønhøvdi
4. Eyrmóttøku

Ferðslunevndin 24. apríl 2019
Málið verið til kunningar.

Tekniska Nevnd 24. apríl 2019
Nevndin tekur undir við HaVN 23-04-2019.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 26. apríl 2019
Nevndin tekur undir við HavN 23-04-2019 og TN 24-04-2019.

Fíggjarnevndin 30. apríl 2019
Nevndin tekur undir við HaVN 23-04-2019 og TN og UBN 24-04-2019 og heitir á landið um at geva byrgingini um Haraldssund og umkoyringarvegnum undir Kjøli hægstu raðfesting øllum Norðoyggjum at gagni.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Tilmælið frá FíN 30-04-2019 einmælt samtykt.

60/19

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.

1 Havna- og Vinnunevndin	23.04.2019	15/19
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	26.04.2019	64/19
3 Klaksvíkar Býráð	02.05.2019	60/19
4 Ánanevndin	08.05.2019	8/19

19/00481-1 Regulering av økismarki suður og vestureftir (B14)

Frágreiðing um málið:
Málið (17/01479) um víðkan av økisparti B14 í Ánunum (víst orange á kortinum niðanfyri) varð endaliga samtykt á býráðsfundi 31. jan. 2019 og sent Heilsu- og Innlendismálaráðnum til góðkenningar 21. febr. 2019. – Fyrisitingin bíðar nú eftir svari frá HIMR.

Í samband við at arbeitt nú verður við landstøð sunnanfyri oljuøkið, verður neyðugt at víðka B14-økið sum víst við reyðum á kortinum.



Lógargrundarlag:
Býarskipanarlógin

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Verður tikið undir við málinum um landstøð á sunnara parti í B14 økinum (mál nr. 17/00474), mælir Tekniska Fyrisiting til, at farið verður undir tilgongdina við broyting av byggisamtykt sum skjótast, samstundis sum undirheitið til Vinnuøkið verður víðkað til eisini at umfata aling.

Havna- og Vinnunevndin 23. apríl 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 08-04-2019.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 26. apríl 2019
Nevndin tekur undir við HaVN 23-04-2019.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Tilmælið frá UBN 26-04-2019 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

61/19

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	26.04.2019	57/19
2 Klaksvíkar Býráð	02.05.2019	61/19

18/00518-18 Fastognir, íløgur – raðfesting 2019

Frágreiðing um málið:
Í samband við at Klaksvíkar kommuna byrjar nýtt fíggjarár, hevur tekniska fyrisiting hugt eftir raðfestingum av fastognum fyri fíggjarárið 2019 saman við UBN-formanninum.

Játtanin fyri fíggjarárið 2019 er 2,0 mió. kr.

Uppskot formanins til raðfesting 2019:

Skúlin á Syðradali *(samtykt)*	kr.	300.000,-
Innrætting, Klaksvíkar Róðrarfelag *(samtykt)*	kr.	334.595,-
Umraðfesting til Spæliland	kr.	1.289.562,-
Tilfar til Klubban *(samtykt)*	kr.	75.844,-

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Raðfestingin av fastognum fylgir fíggjarkarminum fyri fíggjarætlan býráðins 2019.

Tilmæli:
Málið verður við hesum latið nevndini til viðgerðar og støðutakan

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 26. apríl 2019
Ein meiriluti, KEZ og SVJ, tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-04-2019.
Ein minniluti, GvK, tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-04-2019, men mælir til, at kr. 1.289.562 í staðin verða játtaðar til Íverksetarahúsið.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá UBN 26-04-2019; tað fall við 5 atkvøðum fyri (GvK, ASJ, BJ, HJS og SOJ) og 6 atkvøðum ímóti (JS, SVJ, TJL, KEZ, ÓML og BK).

Atkvøtt varð síðani um meirilutatilmælið frá UBN 26-04-2019; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJL, KEZ, ÓML og BK) og 2 ímóti (BJ og SOJ), og 3 blankar atkvøður vóru (GvK, ASJ og HJS).

62/19

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	26.04.2019	56/19
2 Fíggjarnevndin	30.04.2019	48/19
3 Klaksvíkar Býráð	02.05.2019	62/19

18/00518-22 Bygging bústaðir, íløgur – raðfesting 2019

Frágreiðing um málið:
Á fíggjarætlanini fyri 2019 eru 24 mió. kr. settar av til *Byggibúning, Bústaðir*.

Av verkætlanum, sum goldnar verða av konto *Byggibúning, Bústaðir*, eru m.a.: nýggir vegir, sum geva møguleika fyri grundstykkjasølu; útstykkingarvegir, sum ikki eru gjørdir lidnir; og vegir til eldri sethúsaøkir.

Raðfesting í 2019 - uppskot:

Uppskot um verkætlanir at fremja í 2019:	**Kr.**
Keyp av lendi (Akursmørk)	725.000
Tøkt til matrikuleringsútreiðslur har kommunan er partur	200.000
Vegir til sethúsaøkir (Garðsgøta – Raðhúsini ml. Skálta-/Stangaveg – Niðan Horn)	4.800.000
Útstykking á Fossum	17.475.000
Edmundstrød	800.000
Í alt:	24.000.000

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Fíggjarætlan 2019.

Arbeiðsgongdin síðani í 2009 hevur verið tann, at møgulig meirinntøka av grundstykkjasølu í árinum hevur ført til eina eykajáttan í árinum, sum verður brúkt til átrokandi arbeiðir í ólidum útstykkingum í kommununi.

Tilmæli:
Málið verður við hesum latið nevndini til viðgerðar og støðutakan.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 26. apríl 2019
Ein meiriluti, KEZ og SVJ, tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-04-2019. Meirilutin mælir til, at 400 tús. kr. verða settar av til keyp av lendi til útstykking á Syðradali; peningurin verður játtaður av avsetingini til útstykking á Fossum.
Ein minniluti, GvK, tekur støðu í býráðnum.

Fíggjarnevndin 30. apríl 2019
Ein meiriluti, JS, SVJ og TJL, tekur undir við meirilutanum í UBN 24-04-2019.

Ein minniluti, GvK og HJS, tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Tilmælið frá meirilutanum í FíN 30-04-2019 einmælt samtykt.

63/19

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	23.04.2019	38/19
2 Klaksvíkar Býráð	02.05.2019	63/19

19/00326-6 Ferðavinnuátak - closed for maintenance

Frágreiðing um málið:
Beint eftir nevndarumfarið seinast vendi Olivia Døgg Fríðfinnsdóttir, sum starvast á Visit Norðoy, sær til umsitingina. Orsøkin var ferðavinnuátak hjá Visit Faroe Islands undir heitinum "Closed for maintenance". Visit Faroe Islands hevði tá vent sær til Oliviu Døgg Fríðfinnsdóttir, har tey geva henni samsýning at samskipa átakið, umframt kost og uppihald hjá 15 ferðafólkum, sum koma til Føroya at arbeiða í tveir dagar í samband við hetta átakið. Spurt varð tá, um kommunan vildi stuðla hesum átaki.

Síðan er vorðið greitt, at ætlanin er at gera góðar 300 metrar av gøtu av Hálsi niðan ímóti Klakki. Gøtan er sera slitin í støðum, og festarin av lendinum, Hanus Hansen, hevur tí verið sera jaligur um hetta átak.

Aðrir partar av somuleiðis víst átakinum vælvild við at veita arbeiðsskúr og líknandi.

Samlað vantar nú verkætlanini kr. 51.000, harav størstu partarnir fara til at grava veitir (áðrenn átakið byrjar), tyrluflutning av tilfarinum og grót frá grótbrotinum.

Talan er um eitt menningar- og marknaðarátak, og tá talan er um eina verkætlan, ið kann gagna Klaksvík og Norðoyggjum sum ferðamál, samstundis sum talan er um eitt marknaðarátak, har kommunan kann vísa seg frá síni bestu síðu, umframt at aðrir partar eisini luttaka við stuðli, hevur umsitingin mælt til at stuðla hesum átaki.

Av tí at málið hevði skund (átakið verður 26. og 27. apríl og má fyrireikast frammanundan), samstundis sum fígging kann finnast innan verandi rakstrarjáttan á mentanarøkinum, hava borgarstjórin og nevndarforkvinnan játtað at tiltakið fær stuðul áljóðandi kr. 51.000.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Parturin hjá Klaksvíkar kommunu verður fíggjaður gjøgnum minninýtslu til Norðurljós og minninýtslu av játtanini, sum var markað til setan av fólki hjá kunningarstovuni.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin, hóast málið longu er sett í verk, tekur undir við at stuðla hesum átaki.

Mentanarnevndin 23. apríl 2019
Ein meirluti (SVJ, BK, ÓML) tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-04-2019.
Ein minniluti (GvK) tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-04-2019, men mælir til, at Visit Faroe Islands ber allan kostnaðin.
Atli S. Justinussen tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá MeN 23-04-2019; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJL, KEZ, ÓML, BK, ASJ, HJS og SOJ) og ongari ímóti, og 2 blankar atkvøður vóru (GvK og BJ).

64/19

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	23.04.2019	34/19
2 Ferðslunevndin	24.04.2019	20/19
3 Tekniska Nevnd	24.04.2019	35/19
4 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	26.04.2019	59/19
5 Klaksvíkar Býráð	02.05.2019	64/19

19/00423-3 Byggiloyvi til ljósmastrar til vøllin við Djúpumýru – Vinnu- og mentanardeildin

Frágreiðing um málið:
Eirikur í Jákupsstovu, vinnu- og mentanarstjóri søkir vegna Klaksvíkar kommunu um byggiloyvi til ljósmastrar rundan um vøllin við Djúpumýru.
Talan er um 4 mastrar, sum hava ein diametur upp á 1,10 metrar (kantutar og heilar), og eru tær 29,35 metrar høgar mált frá vøllinum.
Mastur nr. 1 og 2 eru staðsettar í koyribreytini í Bøgøtu, mastur nr. 4 í koyribreytini í Jógvan Waagsteinsgøtu og mastur nr. 3 uppat grannaogn (sethús) matr.nr. 755.



Lógargrundarlag:
Økið er útlagt til: ***C2 Ítróttarøki og mentunnarøki,*** *har loyvi er at byggja almennar bygningar so sum til undirvísingarendamál, frítíðarendamál s.s. ítróttur, dansur, biografur o.líkn. Sambýlir fyri menningar- og rørslutarnað.*

Bygningshædd í mun til miðaljørðildi (í mesta lagi) 15 m.

Ljósmastrar eru ikki nevndar í økisásetingunum fyri økið, og eru tær sambært ***Bygningkunngerðini BK17*** í pkt. ***1.2 Nýtsluavmarkingar av bygningsreglugerðini*** heldur ikki frítiknar fyri ikki at søkja um byggiloyvi.

Út frá hesum metir tekniska fyrisiting, at tað krevst frávik fyri at geva loyvi. Tað vil siga, at umsóknin skal eisini sendast grannunum til hoyring.

Fíggjarligar avleiðingar:
Í hesum málinum verður bert viðgjørt sjálvt byggiloyvið til ljósmastrarnar.

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting er av teirri fatan, at tá økið er útlagd til m.a. ítrótt, so eigur tað eisini at vera møguligt at seta ljósmastrar upp, soleiðis at ítróttarøkið eisini kann nýtast tann myrka partin av árinum.
Sjálvandi má hetta gerast í samráð við grannar, soleiðis, at teir hava so lítlan ampa sum møguligt av ljósi frá mastrunum. Hetta kann møguliga gerast, við at ljósið ikki verður nýtt áftaná kl. 21.00 gerandisdagar og aftaná kl. 18.00 í vikuskiftum.

Hugsast má eisini um óljóð, orsakað av vindi frá ljósmastrunum.

Ferðsluviðurskiftini mugu eisini fást í rættlag. Verja má gerast rundan um fundament/mastrar, so tær vera vardar fyri tungum akførum.

Mentanarnevndin 23. apríl 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-04-2019, men mælir til, at ljósini verða sløkt kl. 23.00 hvørt kvøld.

Ferðslunevndin 24. apríl 2019
Nevndin tekur undir við MeN 23-04-2019.

Tekniska Nevnd 24. apríl 2019
Nevndin tekur undir við MeN 23-04-2019 tó uttan tíðaráseting fyri, nær ljósini skulu sløkkjast.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 26. apríl 2019
Nevndin tekur undir við MeN 23-04-2019 og FeN 24-04-2019.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá JS, um at skipanin, har ongin tíðaráseting er sett á, hvussu leingi ljósini kunnu lýsa út á kvøldið, skal verða roynd í eitt ár. Tað varð einmælt samtykt.
Annars einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 03-04-2019.

65/19

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	23.04.2019	39/19
2 Fíggjarnevndin	30.04.2019	58/19
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	02.05.2019	65/19
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	29.05.2019	

19/00502-4 Tónlistaskúlin - hækkað lønarstøði eftir sáttmálasamráðingar – *fyrra viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Sáttmálin hjá tónleikalærarunum gekk út 1. oktober 2017. Síðan tá hava tónleikalærararnir fyribils verið løntir eftir sáttmálanum, sum var farin úr gildi.

8. februar í ár varð semja gjørd millum partarnar, sum gevur eina lønarhækking. Hetta hevur við sær, at avsetingin til Tónlistaskúlan ikki samsvarar við lønirnar, ið skulu rindast út í ár (landið ber 50% og kommunan 50% av lønarútgjaldingunum).

Neyðugt verður at rinda kr. 240.000 meira í lønum í 2019 hjá Klaksvíkar Tónlistaskúla, um skúlin skal hava sama tímatal. Við hækkaðum næmingagjøldum megnar skúlin sjálvur at útvega kr. 25.000. Samlaða úrslitið er sostatt ein meirútreiðsla á kr. 215.000, harav 60.000 er ein eingangsútreiðsla.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um musikkskúlaskipan

Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Av tí, at talan er um eina útreiðslu, sum einans hongur saman við, at eitt úrslit endiliga er komið á sáttmálasamráðingar, samstundis sum onki hevur verið sett av til lønarframskrivingar, hóast tað er bróðurparturin av útreiðslunum hjá Tónlistaskúlanum, og ongin játtan er tøk til endamálið, verður talan um eykajáttan av tøkum peningin á tilsamans kr. 215.000.

Tilmæli:
Mælt verður til at veita Klaksvíkar Tónlistaskúla eykajáttan á kr. 215.000 av tøkum peningi til hesa lógar- og sáttmálabundnu útreiðslu, sum tónlistaskúlin ikki hevur nakra ávirkan á.

Mentanarnevndin 23. apríl 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-04-2019.

Fíggjarnevndin 30. apríl 2019
Nevndin tekur undir við MeN 23-04-2019.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Tilmælið frá FíN 30-04-2019 einmælt samtykt.

66/19

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.03.2019	18/19
2 Fíggjarnevndin	26.03.2019	36/19
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	28.03.2019	48/19
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	02.05.2019	66/19

18/00501-21 Dagstovnaeindin á Brekku – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 28. mars 2019.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. marts 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 22-02-2019.

Fíggjarnevndin 26. mars 2019
Nevndin tekur undir við B&U 19-03-2019.

Klaksvíkar Býráð 28. mars 2019
Tilmælið frá FíN 26-03-2019 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Tilmælið frá BýR 28. mars 2019 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

67/19

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.03.2019	41/19
2 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	28.03.2019	47/19
3 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	02.05.2019	67/19

18/00496-54 Framflytingar 2018/2019 – *seinna viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 28. mars 2019

Fíggjarnevndin 26. mars 2019
Ein meiriluti, JS, SVJ og TJL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 22-03-2019.
Ein minniluti, GvK og HJS, tekur undir við framflytingunum og heldur seg í samband við lántøku á 15 mió. kr. til býráðssamtyktina frá 28-02-2019.

Klaksvíkar Býráð 28. mars 2019
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá Jógvani Skorheim: *Mælt verður til at taka undir við uppskotnu framflytingunum, men at lántøkan á 15 mió. kr. til Biskupstorg ikki verður partur av málinum.* Broytingaruppskotið varð einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Tilmælið frá BýR 28. mars 2019 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

68/19

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.03.2019	22/19
2 Fíggjarnevndin	26.03.2019	39/19
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	28.03.2019	49/19
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	02.05.2019	68/19

18/00052-28 Nýtsla av vardum verkum – Fjølrit – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 28. mars 2019

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. mars 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 13-03-2019.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Fíggjarnevndin 26. mars 2019
Nevndin tekur undir við B&U 19-03-2019.

Klaksvíkar Býráð 28. mars 2019
Tilmælið frá FíN 26-03-2019 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 02. mai 2019
Tilmælið frá BýR 28. mars 2019 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.